SKYN

# Ikki bert ognir, men heim



## VESTMANNA

Sethús, Toftavegur 17

130 220 2 1920

Sera hugnalig hús við góðum útsýni. Húsini eru í tveimum hæddum. Í niðaru hæddini er durur/gongd, baðirúm, køkur og stova. Í ovaru hæddini eru fýra kømur. Talan er um eini eldri hús, men nógvar umvælingar eru gjørdar. Takið er nýtt, og ketilin er eisini nýggjur. Vindeygu og klædningur vórðu skift í 2000, og tá vórðu øll gólvini í niðaru hæddini eisini skift. Í fjør vórðu húsini bjálvað, og baðirúmið varð gjørt av nýggjum. Húsini standa væl fyri beint við skúlan, ítróttarhøllina, barnaansing og handil. Útsýnið er sera gott yvir bygdina og fjørðin.

Prísuppskot: kr. 850.000








SENDISTOVAN

## SKÁLA

Sethús, Hórheiðar 1



125 815 2 2006




Nýggj og snøgg hús í tveimum hæddum. Í miðhæddini er hjallur, gongd, baðirúm, køkur, stova og tvey kømur. Á loftinum, sum ikki er liðugt bygt, er loftsstova, baðirúm og tvey kømur Eisini er krúpikjallari. Innan er alt nýtt, ljóst og snotiligt. Húsini standa væl fyri á Skála við sera góðum útsýni.

Prísuppskot: kr. 1.000.000

## HOYVÍK

Sethús, millum Gilja 62



226 506 3 1987




Góð sethús við íbúð. Í miðhæddini er gongd, køkur, brúggers, stova og baðirúm. Á loftinum er alrúm, trý kømur, baðirúm og goymslurúm. Í niðastu hæddini er fýrrum/kjallararúm og ein íbúð. Í íbúðini er gongd, stova/køkur, tvey kømur og baðirúm. Húsini standa í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi og hava nakað av útsýni. Býlingshús, skúlar og handlar eru nær við, og bussambandið er gott.

Prísuppskot: kr. 2.300.000